# Ársfrágreiðing 2022

Vit frøddust um, at nógv fólk møttu til aðalfundin, sum vit hildu á Hotel Hafnia í fjør.

Arbeiðssetningurin hjá nevndini í Diabetesfelagnum sigur, at vit skulu hava sum mál at skipa fyri trimum ella fýra tiltøkum um árið og vanliga liggur eitt av teimum saman við aðalfundinum. Soleiðis var eisini í fjør, tá vit settu fokus á upprunan til insulinframleiðslu. Jens Andreassen og Herborg Johannesen, yvirlæknar á Landssjúkrahúsinum høvdu fyrilestur. Tey greiddu frá áhugaverdu søguni, sum byrjaði í Kanada, og hvussu hon breiddi seg til Danmarkar, har insulinframleiðsla fekk so týðandi leiklut.

Kristianna Rein hevði eisini ein fyrilestur um Life for a Child, sum hon saman við øðrum ger eitt stórt arbeiði fyri at savna pening inn til.

## Nordic Forum

Nordic Forum, sum er tað norðurlendska samstarvið millum diabetesfeløg, var í Keypmannahavn síðst í august. Av ymsum orsøkum hevur einki Nordic Forum verið síðani 2018, tá tað var í Føroyum, so tað var gott at møtast aftur. Regluligir fundir hava tó verið øll árini umvegis talgilda Teams.

Høvuðsevnini, sum vóru á skránni vóru:

1. Hvussu fáa vit pening til vega at dríva virksemið í diabetesfeløgunum
2. Diabetes og mental heilsa
3. Diabetes og teknologi

Hetta eru alt evni, sum eru sera aktuell í øllum limalondunum. Arbeitt varð í bólkum um evnini, har vit lærdu av hvør øðrum og eisini vóru fyrilestrahaldarar, sum vóru væl brynjaðir við nýggjastu vitan á umráðnum.

Tað er altíð gott at hoyra, hvat fer fram í hinum londunum og ofta koma vit heim aftur stimbraði av samstarvinum og samskiftinum við okkara grannalond.

## Samstarvsavtala um stenomiðstøð

**26. september 2023** varð ein nýggjur kapittul skrivaður í føroyskari diabetessøgu, tá samstarvsavtala varð undirskrivað millum Novo Nordisk Grunnin øðrumegin og Heilsumálaráðið (landsstýrið) hinumegin um eina føroyska Steno Miðstøð.

Tvinnar avtalur blivu undirskrivaðar hendan dagin á Hotel Føroyum: Ein játtanaravtala og ein byggiavtala.

Hetta var ein stórur hátíðardagur við røðum og innbodnum gestum, og eg fekk sum forkvinna í Diabetesfelagnum eisini høvi at halda røðu. Boðskapurin var í stuttum tann, at samstarvið kann vera við til at tryggja bestu umstøður fyri fólk við diabetes í Føroyum, at styrkja munandi um granskingina á økinum og enntá vera við til at minka um títtleikan av typu 2 diabetes. Sum Diabetesfelag var okkara boðskapur eisini, at Steno Miðstøð Føroya eigur at røkka út kring landið alt, eisini tey, sum ikki eru knýtt at Miðstøðini.

## ALTJÓÐA DIABETSDAGURIN

Stenomiðstøðin bleiv eisini høvuðsevnið á altjóða diabetesdegnum **14. november.** Tá bjóðaði Diabetesfelagið Gunnvá Guttesen, leiðara á Medisinska deplinum á Landssjúkrahúsinum (og harvið Steno Miðstøðini, at leggja fram á evnisdegi á Parnassinum á Hotel Hafnia. Sera mong fólk møttu og settu góðar og viðkomandi spurningar, sum góvu íblástur til framhaldandi arbeiðið hjá fakfólkunum við Steno Miðstøðini.

## IDF

IDF aðalfundirnir vóru í Lissabon, Portugal í desember. Allan Skaalum og eg sjálv luttóku. Nógv fólk bjóða seg framvegis til at leiða arbeiðið á diabetesøkinum altjóða, og nýggja nevndin í IDF Europe næstu tvey árini bleiv mannað, og somuleiðis bleiv nevndin, sum skal taka við um tvey ár í altjóða IDF, vald. Aðalfundurin valdi Peter Schwartz, professara, at taka við forsetasessinum í IDF, tá Akhtar Hussein, professari leggur frá sær í desember 2024, og Iryna Vlasenko úr Ukraina bleiv vald sum næstrforkvinna.

## STENO MIÐSTØÐ FØROYA ALMENT UPPLATIN

3. mars lat so Steno Miðstøð Føroya dyrnar upp í øðrum vonginum í útistovu á Landssjúkrahúsinum. Hendan dagin var móttøka fyri innbodnum, og umframt landsstýriskvinnuna, so hildu eisini Herborg Johannesen, serlækni, og Jens Andreasen, deildarlækni røður. Diabetesfelagið bleiv nevnt í røðunum, og dentur varð lagdur á tað samstarv, sum verið hevur, og tað samstarv, sum eisini stendur fyri framman millum Steno Miðstøðina og okkara felag.

Áhugaverdu røðurnar liggja á okkara heimasíðu, sum tit kunnu lesa við høvi.

## Framtíðin

Fyrireikingar eru í gongd við einum almennum, stórum átaki, sum hevur til endamáls at fyribyrgja typu 2 diabetes. Við hesum átakinum vilja vit royna at fáa fólk við prediabetes ella fólk, sum eru í vanda fyri at fáa tað, at fara til lækna at lata seg kanna. Diabetesfelagið hevur sum kunnugt fingið fíggjarligan stuðul frá Betri Grunninum til hetta átakið. Eftir ætlan verður tað Nudlavirkið, sum kemur at hjálpa okkum at gera átakið, so tað røkkur út so langt sum gjørligt.

Longu **27. apríl**, kemur danski professarin, Ingrid Willaing, frá Steno Keypmannahavn, at hava tveir fyrilestrar, sum Diabetesfelagið skipar fyri í samstarvi við Steno Miðstøð Føroya. Ingrid Willaing hevur granskað í, hvussu man kann fyribyrgja diabetes-komplikatiónir og økja lívskvalitetin hjá persónum við diabetes og teirra familjum. Ingrid hevði ein fyrilestur á Nordic Forum, og tað var tá, at vit tosaðu við hana um at koma hendavegin.

Annar fyrilesturin hjá henni verður fyri læknar, sjúkrarøktarfrøðingar og onnur, sum arbeiða við fólki við diabetes. **Heitið á honum verður**:

> *Diabetes-strongd: Kensluliga reaktiónin upp á lívið við diabetes. Hvussu vísir diabetes-strongd seg, hvussu staðfesta og máta vit diabetes-strongd, og hvat kann gerast?*

Hin verður **fyri fólk við diabetes** og teirra avvarandi og **heitið verður**:

> *Stúran, ørkymlan og kensluligir trupulleikar eru mangan partur av lívinum við diabetes – hvat vita vit um tað, og hvat kann gerast við tað?*

Báðir fyrilestrarnir verða í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum, og skjótt fara vit at lýsa við teimum.

Í juli fer Bára Joensen, sum umboðar tey ungu í Diabetesfelagnum til Bulgaria at luttaka í IDF Europe Youth Leadership Champ. Hetta er ein lega, sum leggur seg eftir at útbúgva ung fólk at umboða diabetesøkið og skapa eitt netverk millum diabetesfeløg í øllum Europa. Alt fyri at betra um lívið og liviumstøðurnar hjá teimum við diabetes. Vit gleðast um, at Bára vil fara, tí í mong ár hevur einki umboð verið úr Føroyum.

Nógv hendir í løtuni á diabetesøkinum í Føroyum. Við nýggju Steno Miðstøðini, fleiri granskingarpengum og sum heild størri fokus á diabetes, er týdningarmikið, at vit øll, bæði Diabetesfelagið, fólk við diabetes og avvarandi, taka væl ímóti teimum initiativum, eru og koma og kanska bjóða seg fram at taka lut í teimum kanningum, sum verða gjørdar.

Tórshavn 22.03.23

May-Britt Skoradal, forkvinna
Diabetesfelagið